**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

| Galdandi lóggáva | Broytingaruppskot |
|---|---|
| **§ 9, stk. 2.** Stuðul til uppihald sambært stk. 1 verður veittur sambært fylgjandi ásetingum:<br>1) Persónur, ið býr einsamallur og hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 90% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>2) Persónur, ið er sambúgvandi og hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 70% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>3) Persónur 25 ár og eldri, ið býr einsamallur og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 75% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>4) Persónur 25 ár og eldri, ið er sambúgvandi og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 50% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>5) Persónur yngri enn 25 ár, ið ikki býr hjá einum ella báðum foreldrum og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 40% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>6) Persónur yngri enn 25 ár, ið býr hjá einum ella báðum foreldrum og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 22% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. | **§ 9, stk. 2.** Stuðul til uppihald sambært stk. 1 verður veittur sambært fylgjandi ásetingum:<br>1) Persónur, ið býr einsamallur og hevur **uppihaldsskyldu** forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær **16.079 kr.** um mánaðin.<br>2) Persónur, ið er sambúgvandi og hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **12.506 kr.** um mánaðin.<br>3) Persónur 25 ár og eldri, ið býr einsamallur og ikki hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **13.400 kr.** um mánaðin.<br>4) Persónur 25 ár og eldri, ið er sambúgvandi og ikki hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **8.933 kr.** um mánaðin.<br>5) Persónur yngri enn 25 ár, ið ikki býr hjá einum ella báðum foreldrum og ikki hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **7.146 kr.** um mánaðin.<br>6) Persónur yngri enn 25 ár, ið býr hjá einum ella báðum foreldrum og ikki hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **3.931 kr.** um mánaðin. |
| **§ 9, stk. 3.** Dagpeningaupphædd sbrt. stk. 2 og § 13 er hægsta útgjald sambært lóg um dagpening vegna sjúku v.m., frítíðarløn ikki íroknað. Sambúgvandi sbrt. stk. 2 er at skilja sum persónur, sum býr saman við øðrum vaksnum persónum. | **§ 9, stk. 3.** Sambúgvandi sbrt. stk. 2 er at skilja sum persónur, sum býr saman við øðrum vaksnum persónum. |
| **§ 9, stk. 7.** Hjá persóni sbrt. stk. 2, nr. 2 verður inntøka hjá møguligum hjúnafelaga mótroknað við 50% av inntøkuni, sum er hægri enn 70% av dagpeningaupphæddini. Hjá persóni sbrt. stk. 2, nr. 4 verður inntøka | **§ 9, stk. 7.** Hjá persóni sbrt. stk. 2, nr. 2 verður inntøka hjá møguligum hjúnafelaga mótroknað við 50% av inntøkuni, sum er hægri enn **12.506 kr.** Hjá persóni sbrt. stk. 2, nr. 4 verður inntøka hjá møguligum |

| | |
|---|---|
| hjá møguligum hjúnafelaga mótroknað við 30% av inntøkuni, sum er hægri enn 50% av dagpeningaupphæddini. Hjá persóni sbrt. stk. 2, nr. 5 verður inntøka hjá møguligum hjúnafelaga mótroknað við 30% av inntøkuni, sum er hægri enn 40% av dagpeningaupphæddini. | hjúnafelaga mótroknað við 30% av inntøkuni, sum er hægri enn **8.933 kr.** Hjá persóni sbrt. stk. 2, nr. 5 verður inntøka hjá møguligum hjúnafelaga mótroknað við 30% av inntøkuni, sum er hægri enn **7.146 kr.**<br><br>**§ 9, stk. 8. Upphæddir sambært stk. 2 og 7 og § 13, stk. 1 og 4 verða javnaðar sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.** |
| **§ 13, stk. 1.** Tá ið ein persónur, ið ikki er fevndur av veitingum eftir løgtingslóg um almannapensjónir, varandi hevur tørv á hjálp til sítt og familjunnar uppihald, fær viðkomandi eina upphædd samsvarandi við 60% av dagpeningaupphæddini um mánaðin, tó ongantíð hægri enn veiting sbrt. § 9, stk. 2. | **§ 13, stk. 1.** Tá ið ein persónur, ið ikki er fevndur av veitingum eftir løgtingslóg um almannapensjónir, varandi hevur tørv á hjálp til sítt og familjunnar uppihald, fær viðkomandi eina upphædd **á 10.720 kr.** um mánaðin, tó ongantíð hægri enn veiting sbrt. § 9, stk. 2. |
| **§ 13, stk. 4.** Inntøka hjá møguligum hjúnafelaga verður mótroknað við 50% av inntøkuni, sum er oman fyri 60% av dagpeningaupphæddini. | **§ 13, stk. 4.** Inntøka hjá møguligum hjúnafelaga verður mótroknað við 50% av inntøkuni, sum er oman fyri **10.720 kr.** |